## Nei frá Fólkaflokkinum

Tað er ikki bara Føroya Arbeiðarafelag, sum havnar uppskotinum hjá fíggjarmálaráðnum til eina tvungna eftirlønarskipan. Eftir uppskotinum skal samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin umskipast, men tað vil Fólkaflokkurin ikki hoyra talan um. Jørgen Niclasen, formaður í tingbólkinum hjá flokkinum, segði fríggjadagin, at tað er eingin orsøk til at blanda Samhaldsfasta upp í ta tvungnu skipanina.

## Øssur í Sct. Gertrud

Í døgunum frá 17. februar til 3. mars hevur fuglfirðingurin Øssur Mohr listaframsýning í hølunum hjá Galleri Sct. Gertrud í Knabostræde 1A í Keypmannahavn. Talan er um nýggjar málningar, og motivini eru úr føroysku náttúruni. Gallaríið lýsir Øssur sum eitt gott umboð fyri tað nýggja ættarliðið av føroyskum listafólkum. Leygardagin kl. 13 verður fernisering, og tá fer ein annar fuglfirðingur, Stanley Samuelsen, at syngja og spæla.

Pam Offshore Service:

# Vantandi dupultsskattaavtala ger Bretland minni áhugavert

**Hvussu leingi, Pam Offshore Service fer at hava fólk í Melkøya aftrat, er ilt at siga, men í øllum førum er væntandi, at fólk hjá felagnum verða knýtt at hesi verkætlan til páskar, kanska longri. - Vit fara at halda út sum longst, samstundis sum vit liggja fram við at fáa í lag avtalur við feløg um aðrar verkætlanir í sambandi við oljuvinnu í Noregi, sigur stjórin, Gunnar Mohr**

OLJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Pam Offshore Service er beinið hjá Tórshavnar Skipasmiðju í oljuvinnuni. - Vit fara at halda út sum longst, samstundis sum vit liggja fram við at fáa avtalur í lag við feløg um aðrar verkætlanir í oljuvinnuni, sigur Gunnar Mohr, skipasmiðjustjóri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Ein dagin herfyri fóru vit á dyrnar hjá Pam Offshore Service, sum er dóttirfelag hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Felagið er stovnað í 1998, og endamálið er at veita tænastur til frálandavinnuna. Í endamálsgreinini hjá Pam er eisini at útbúgva og menna føroyingar til eina komandi frálandavinnu í Føroyum.

Áðrenn vit leitaðu upp dyrnar í J.C. Svabosgøtu 31, har Pam Offshore Service húsast á ovastu hædd undir hugnaligum skrálofti, høvdu vit tosað við Gunnar Mohr, skipasmiðjustjóra, nakrar dagar frammanundan. Men hendan dagin, vit stóðu inni á gólvinum og høvdu brúk fyri nýggjari mynd av stjóranum, høvdu vit onga avtalu.

Í fyrstu atløgu var ikki líkt til, at vit fóru at finna Gunnar í skrivstovubygninginum.

Ein maður, vit komu í prát við inni á gólvinum, hevði sæð Gunnar stutt frammanundan og helt, at hann mundi ikki vera so langt burtur. Maðurin var beinasamur og kom við at leita eftir stjóranum. Á egnari skrivstovu var hann ikki, men fryntligi maðurin gav ikki upp soleiðis. Hann helt, at kanska sótu tey á fundi í hølunum hjá Pam Offshore Service.

- Tað er bara at fara innar, segði hann.

Nei, tað helt eg ikki, tí eg hevði onga avtalu við stjóran.

- Jú, far bara heilt upp og tak í fyrstu hurðina til vinstru.

Og tað bar til.

### Góður hýrur

Inni á skrivstovuni hjá Pam Offshore Service sótu Gunnar Mohr, skipasmiðjustjóri, Anja Jacobsen, fyrisitingarleiðari og Hans Jacob Poulsen, søluleiðari.

Hans Jacob verður nevniliga ein av fyrilestrahaldarunum á oljuráðstevnuni, sum nú verður í Føroyum.

Vit vóru væl móttikin, hóast vitjanin ikki var fráboðað. Hýrurin var góður, og líkt var til, at "lívið" eisini gongur víðari her, hóast Magnus Magnussen, sum var annar av stjórunum á Tórshavnar Skipasmiðju og stjóri í Pam Offshore Service, ikki longur er við í hópinum.

Vit fylgdust út í túnið við Gunnari Mohr, og har fingu vit so myndina, vit vóru komin eftir.

### Skiftandi hjá POS

Í løtuni hevur Pam Offshore Service einar 60 mans í starvi í Noregi, harav teir flestu starvast á oynni Melkøya, sum liggur út fyri Hammerfest. Eftir lutfalsliga stuttari tíð er hendan oyggin púrasta umgjørd til móttøku av flótandi náttúrgassi av Snøhvit-leiðini. Hetta er ein velduga stór og søgulig verkætlan, sum Statoil stendur fyri, og sum nú líður móti endanum.

Síðan byrjanina í 1998 hevur virksemið hjá Pam Offshore Service verið skiftandi. Tey fyrstu árini vóru einir 10-15 føroyingar í starvi í oljuvinnuni í Noregi, men tá Aker Stord og Aker Kværner Elektro fingu stóran sáttmála í Norðurnoregi, kastaði hetta av álvara eisini av sær til føroyingar. Pam fekk í lag avtalu um arbeiðsfólk, serliga elektrikarar, sveisarar, hjálparfólk og verkfrøðingar.

Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, sigur, at av teimum 60 monnunum, sum Pam Offshore Service í løtuni hevur í arbeiði, arbeiða einir 50 í Melkøya – og 11 í Aukra ella Orminum Langa, sum tann verkætlanin verður rópt.

- Umframt elektrikarar, hava vit í løtuni einar tveir sveisarar í Aukra og eini 5 hjálparfólk í Melkøya, sum er partur av Snøhvit-verkætlanini. Restin av manningini, sum í løtuni eru úti og heima, eru elektrikarar.

### Nýggjar avtalur

Hvussu leingi, Pam Offshore Service aftrat fer at hava fólk í Melkøya, har tað nógva arbeiði hevur verið, er ilt at siga, men í øllum førum er væntandi, at fólk hjá felagnum verða knýtt at hesi verkætlan til páskar, kanska longri.

- Vit fara at halda út sum longst, samstundis sum vit liggja fram við at fáa avtalur í lag við feløg um aðrar verkætlanir í oljuvinnuni.

Gunnar Mohr vísir á, at ein møguleiki er í Egersund, har teir fara at gera flótiflakar til oljuvinnuna. Ein annar er á Stord, har teir fara at byggja boripallar.

- Hetta eru nýggjar verkætlanir, og vit fara at liggja fram við her, sigur skipasmiðjustjórin.

Pam Offshore Service hevur eisini havt nakrar sveisarar í Kristianssand.

### Góðir møguleikar

Gunnar Mohr heldur, at tað eru góðir møguleikar hjá Pam Offshore Service, sum er beinið hjá Tórshavnar Skipasmiðju í oljuvinnuni, at halda fram í Noregi.

- Tá nýggjar verkætlanir fara í gongd, sum eitt nú í Egersund og Stord, gongur ofta ein tíð, áðrenn elektrik-



*Snøhvit-verkætlanin, sum eisini fevnir um oynna Melkøya úti fyri Hammerfest, har teir nógvu føroyingarnir arbeiða, líður nú móti endanum*